Elnevndin

MYNDUGLEIKI INNAN ELLÓGGÁVUNA

Tórshavn tann, 8. februar 2012

**Føroya Kommunufelag**
**Frammi í Gerði 1**
**FO-340 Kvívík**

**Kunning viðvíkjandi el-óhappi í Vestmanna.**

6. oktober 2011 fekk Elnevndin kæru, daterað 20. september 2011, viðvíkjandi el-óhappi í Vestmanna. (kæra viðløgd)

Elnevndin sendi bræv til Vestmanna kommunu 7. oktober 2011, sum hevur ábyrgd av gøtuljósunum, har biðið varð um eina frágreiðing (bræv viðlagt).

18. oktober svaraði Vestmanna kommuna í brævi til Elnevndina (bræv viðlagt).

Av tí at slíkt óhapp kann koma fyri í øllum kommunum, var samtykt á Elnevndarfundi, at Elnevndin skuldi kunna Føroya kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya og Eysturkommunu um málið.

Tað er soleiðis, at tað eru eigararnir (kommunurnar) av innleggingunum, sum hava ábyrgdina av, at elinnleggingarnar er í slíkum standi, at tær yvirhalda reglugerðirnar.

Elnevndin er vælvitandi um, at kommunurnar hava elinnleggjarar, sum hava eftirlit við elinnleggingunum, men tað eru framvegis eigararnir (kommunurnar), sum hava ábyrgdina. (viðlagt "Afsnit 8, 2. udgave", "Ændringsbekendtgørelse BEK nr 618 af 25/06/2008", "Afsnit 6B" og "Ændringer i reglerne om tvungen fejlstrømsafbryder").

Eisini vil Elnevndin minna á, at kommunurnar eisini hava ábyrgdina av innleggingum i samband við høgtíðir, herundir jól (sí viðlagda tilfar frá Sikkerhedsstyrelsen um "sikker belysning hjælper julestemningen på vej"), stevnur (bygda/báta), Ólavssøku v.m. Væntast kann, at eftirlit verður gjørt av nevndu elinnleggingum.

Elnevndin fer tí við hesum skrivi, at heita á Føroya Kommunufelag, um at kunna lima kommunurnar um nevnda.

Vinarliga

**Elnevndin**

Sørin P. Sørensen, formaður

Jógvan Sørin Hansen

:/ Jógvan Sørin Hansen, skrivari